Meginfelag Áhugaleikara Føroya

# Skeiðslýsing av skriviskeiðnum

## Frá hugskoti til handrit:

Á skriviskeiðinum fært tú innlit í og lærir

- hvussu eitt hugskot ella fleiri kunnu gerast til eitt handrit.
- hvørji amboð og hvørji ráð eru at taka til, tá ið tú steðgar upp og ikki veitst, hvussu tú skalt koma víðari í skrivingini.
- hvussu eitt handrit verður skrivað frá byrjan til enda uttan at tað verður keðiligt, og hvussu tú skrivar eina góða samrøðu, sum er partur av søgugongdini.

Hevur tú okkurt liggjandi í skuffuni ella okkurt hugskot, so tak tað við at arbeiða víðari við. Ella kom bara og fá íblástur og lær, hvussu tú kanst skriva eina fangandi leiksøgu.